## Ísrael harmast



Eftir hvassar atfinningar úr fleiri londum sigur ísraelska stjórnin seg harmast um, at avgerðin at byggja nýggjar bústaðir í eystara parti av Jerusalem hevur órógvað viðurskiftini millum Ísrael og USA. Stjórnin sigur seg eisini harmast um, at avgerðin hóttir við at leggja fót fyri royndunum at fáa friðarsamráðingarnar við palestinar tiknar uppaftur. Enn er tó einki, sum bendir á, at stjórnin fer at slaka fyri teimum, sum krevja, at ætlanin um nýggjar búreisingar í eystara parti av Jerusalem verður ógildað. Tað hava ST, ES, USA, Russland og palestinar kravt.

## Aftur jarðskjálvtar

Tveir harðir jarðskjálvtar vóru um vikuskiftið. Tann fyrri var í Japan fyrrapartin í gjár. Hann var 6,6 á Richter-stiganum. Ristingarnar vóru so mikið harðar, at bygningar í Tokyo skulvu og sveiggjaðu, men kortini var lítil og eingin skaði av skjálvtanum. Nakrar fáar tímar aftaná var ein jarðskjálvti í Indonesia. Hann var 7,0 á Richter-stiganum, men heldur ikki har var stórvegis skaði, skrivar AP. Annars hava fleiri jarðskjálvtar verið í Indonesia teir seinastu dagarnar, men teir hava ikki gjørt skaða.

# Kanna mál um misrøkt

**Royndarstøðin og politiið hava verið og kannað viðurskiftini í einum fjósi í Suðuroynni**

LANDBÚNAÐUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Fríggjadagin fór eitt útvalt lið av fólki við Smyrli til Suðuroyar.

Onkur hevði meldað ein festara fyri djórapínslu, og tí fóru fólk frá Búnaðarstovuni og løgreglan, sum hevði djóralækna við sær, at kanna viðurskiftini.

Bjørn Patursson, stjóri í Búnaðarstovuni, kann ikki í dag gera nakrar viðmerkingar til málið, men hann váttar, at tey hava hugt at fjósinum. Nú verður málið nærri viðgjørt.

### Mál í tveimum

Eitt mál sum hetta er í tveimum, tí festarin var meldaður til løgregluna fyri brot á djóraverndarlógina, og tí ger politiið sínar kanningar við hjálp frá fakfólkum.

Búnaðarstovan hevur eftirlit við festunum, og tí vóru fólk frá Búnaðarstovuni eisini í Suðuroynni og hugdu at fjósinum.

Bjørn Patursson kann ikki siga, um nakað var at seta fingurin á, men hann kann siga so mikið, at hevði verið heilt galið, hevði Búnaðarstovan kunnað tikið festi frá festaranum í stundini, og tað hendi ikki.

Úrslitið er treytað av, hvørjar niðurtøður løgreglan og Búnaðarstovan koma til.



*Løgreglan við djóralækna og fólk frá Búnaðarstovuni vóru og kannaðu, hvussu til stóð í fjósinum hjá festaranum. Festarin var meldaður*

## Skeinkiloyvið í vanda

**Politiið í Havn stongdi leygarnáttina eitt vertshús, sum hevði opið ov leingi**

NÁTTARLÍV

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Leygarmorgunin, tá ið klokkan var næstan hálvgum fimm, sóust fólk fara inn á eitt vertshús í Havn, og hetta fekk poltiið eina fráboðan um.

Tá ið politiið fór á dyrnar, vóru 25 fólk inni. Politiið koyrdi tey út og stongdi.

Skeinkistøð hava ikki loyvi at hava opið longur enn til klokkan hálvgum fýra.

Politiið skrivaði frágreiðing um hendingina, og frágreiðingin verður helst løgd fyri loyvisnevndina, við tað at skeinkistaðið hevur brotið treytirnar.

## Bardagi um allan býin

**Politiið í Havn letur illa at leygarnáttina, tí tað vóru so nógvir bardagar inni sum úti**

HARÐSKAPUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Fleiri ferðir leygarnáttina vórðu boð send eftir politinum í Havn, tí fólk vóru farin til hendurs.

So var tað heima við hús, og so var tað á gøtuni.

Í einum føri fekk ein ungur maður nevan frammaná og noyddist á skaðastovuna. Tann, sum hevði sligið varð tikin somu nátt og gisti í arrestini.

Í einum øðrum føri fekk ein bank frá trimum øðrum, og í morgun hevði politiið enn ikki funnið álopsmenninar. Ein av hesum monnunum hevði gingið skrappur í býnum og var nakin yvirbeltið.

Beint fyri døgurða sunnudagin gjørdu fýra ótangar um seg inni á eini matstovu í Havn og vóru heldur harðligir. Eisini tá vórðu boð eftir politinum til at sissa menninar.

## Peningastovnarnir heinta upplýsingar um bústað

**Seinastu dagarnar hava Føroya Banki og Eik Banki sent ávísum kundum brøv, har teir biða um dagførdar upplýsingar um bústaðin. Norðoya Sparikassi og Suðuroyar Sparikassi hava fingið til vega hesar upplýsingar við kundasamrøðum og hava tí ikki sent kundum brøv**

PENINGASTOVNAR

*Tíðindaskriv*

Kundar hjá peningastovnunum hava spurt, hví hetta verður gjørt. Orsøkin er, at nýggj kunngerð um kapitaldekning er komin í gildi í Føroyum. Broyttu reglurnar hava við sær, at verandi mannagongd í sambandi við at virðisáseta sethús í Føroyum ikki er nøktandi.

Í framtíðini verða sethús virðismett eftir einum hagfrøðiligum myndli, ið nýtir upplýsingar frá peningastovnunum um eitt nú søluprís, byggiár, matrikulnummar og búvídd sum grundarlag. Funnið verður við hesum upplýsingum fram til marknaðarvirðið á teimum einstøku bústøðunum í ymsu økjunum.

Fíggjareftirlitið og Fíggjarmálaráðið hava fyribils góðkent hesa mannagongd.

Nú nýggi útrokningarhátturin verður mentur, dagføra peningastovnarnir bústaðarupplýsingar hjá teimum kundum, har skrásetingar um bústaðin ikki eru nøktandi. Vónandi kann hetta verða gjørt í besta samstarvi millum peningastovnarnar og kundarnar.

## Frí atgongd at stjala

TJÓVARÍ

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Leygarnáttina hava óbodnir gestir verið inni á matstovuni Nantong í Havnar Klubba.

Innbrotsfólkini sluppu frá at bróta inn, tí teir sleppu inn gjøgnum ostongdu liftina.

Fýra túsund krónur og nakað av rúsdrekka eru horvin.

Politiið sigur seg hava illgruna til í hvussu er eitt fólk.